# Norð – undirvísingargongd

**Evni:**

Frá barni til vaksin

Trúgv og átrúnaður

**Lærugrein:**

Føroyskt

**Málbólkur:**

6.-10. fl.

**Høvundur**

Hanne Schriver, VIA CFU




**Camilla Hübbe og Rasmus Meisler: Norð. BFL 2019. Pappírsbók** (bókin er eisini talgild nord.nam.fo)

## Fakligur týdningur/førleikaøki

Undirvísingargongdin er gjørd til pappírsútgávuna.

Í hesari læraravegleiðingini verður arbeitt tulkingar- og framløguførleikunum.

Grafiska skaldsøgan verður á blogguni hjá bókini lýst sum "Nordic Magic Realism," altso sum gandakend norðurlendsk realisma, har skaldsøgan gongur fyri seg í trimum sporum: fortíð, nútíð og framtíð, sum í einum norðurlendskum huglagi á gandakendan hátt verða tvinnað saman, bæði myndaliga og tekstliga.

## Hugskot til undirvísingina

**Áðrenn lisið verður**

**Hvør sær**

Næmingarnir fara inn á http://www.nord-app.com/visuals/

Byrja við at gera eina avtalu við næmingarnar um, at tey bara fara á síðuna við myndum út NORÐ. Tey "lesa" myndirnar og skriva síðan hvør sær teirra boð uppá, hvat tey vænta av lesingini í mun til

- Persónar
- Umhvørvi
- Huglag
- Frásøguna/søgugongdina

Næmingarnir leggja hetta út á eina talgilda uppslagstalvu, t.d. Padlet ella OneNote í O365.

**Meðan lisið verður**

**Hvør sær**

Næmingarnir skriva niður støð

- Har tey halda, at NORÐ gerst sjónlig
- Har tey halda, at tað er spennandi skifti millum nútíð, fortíð og framtíð

**Eftir lesna**

**Hvør sær og felags**

Hvør næmingur skrivar 3-5 spurningar til persónarnar í tekstinum á smáar pappírslepar. Hesir verða lagdir í ein kassa. Flokkurin setir seg í runding. Ein bóltur verður brúktur, og spurningarnir úr kassanum verða svaraðir.

**Soleiðis gera tit:** Ein næmingur kastar bóltin til ein annan. Tann sum fær bóltin tekur ein spurning úr kassanum, lesur hart og roynir at svara. Makkararnir høgru- og vinstrumegin kunnu hjálpa ella leggja afturat. Síðan kunnu onnur gera viðmerkingar til spurningin. Tann sum hevur bóltin kastar hann víðari til annan næming ... o.s.fr.

**Pør ella bólkar við fýra**

Brúka fylgjuskjal 1 á síðu 4.

Bólkurin velur trý fokusøki og teknar rundingar um tey á fylgjuskjalinum. Bólkurin ger eitt PowerPoint, eitt Prezi ella líknandi, sum verður brúkt til framløgu í flokkinum.

Seinni verða teir fakligu partarnir viðgjørdir í mun til

- Innihald – tað føroyskt fakliga
- Tað talgilda – talgildu partarnir í framløguni

**Flokssamrøða**

Teldutøka uppslagstalvan verður latin upp, og flokkurin skiftir orð um væntanir til persónar, umhvørvi, huglag og søgugongdina borið saman við greining og tulking av NORÐ.

Tey trý sporini í bygnaðinum fortíð, nútíð og framtíð verða drigin inn í samrøðuna. Tað verður borið saman við nútíðina/veruleikan hjá næmingunum sjálvum. Harafturat verður skift orð um

- Fjøltýdningin í heitinum NORÐ
- **NORÐ**. Hvar gerst hon sjónlig? Hvørjar kenslur skiftir hon ímillum?
- **Gráryggur**. Hvat umboðar Gráryggur?
- **Ratatoskur**. Hvønn leiklut (funktión) hevur hann?
- Tær tríggjar nornurnar **Urð, Skuld** og **Verðandi**. Hvussu eru tær? Hvønn leiklut hava tær?
- **Hyggjara leikluturin hjá næminginum**. Hvør næmingur kann skriva sítt boð á eitt nýtt uppslag á talgildu uppslagstalvuna áðrenn orðaskifti í flokkinum. Hvat hevur framtíðin at bjóða? Eru spor í skaldsøguni?

### Frásjónargerð

#### Pararbeiðið

Næmingarnir hyggja at talgildu útgávuni av NORÐ og gera eina samanberandi greining av styrkjunum í pappírsútgávuni og styrkjunum í talgildu útgávuni.

Flokssamrøða við felags orðaskifti um hetta.

#### Framløguuppgáva

Hygg at bókalýsingini.
https://vimeo.com/user12091799/review/389982244/1f44574269

Næmingarnir gera teirra egnu bókalýsing. Verkini, sum koma burtur úr, verða skiftivís løgd fram í bólkum við fýra næmingum. Her greiða næmingarnir eisini frá teirra valum (hví tey valdu júst hasar myndirnar v.m.).

# Fylgjuskjal 1:

## Hvør ætt er týdningarmest í NORÐ?

- set ring um tær ættir, tit ætla at arbeiða við.

